# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Løgreglutíðindi:

## Friðarligt vikuskiftið og tó



Vikuskiftið hevur verið friðarligt, men altíð er okkurt at gera hjá løgregluni. Í miðbýnum í Havn varð ein maður skallaður niður, og eisini er rúturin á Sethúsasøluni brotin

**Eldur, harðskapsmál, ávirkaðir bilførarar er tað, sum løgreglan hevur brúkt sína orku upp á um vikuskiftið. Av løgreglutstøðini siga teir tó, at vikuskiftið hevur verið at teimum friðarligu**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tá vit tosaðu við løgregluna í morgun varð sagt, at vikuskiftið hevur verið av teimum friðarligu. Tað er tó altíð okkurt at gera, og løgreglan hevur heldur ikki sitið hendur í favn.

Um hálvgum fimmtíðina leygarmorgunin var løgreglan úti til eitt harðskapsmál í miðbýnum í Havn. Ein maður varð skallaður niður, men tá vit høvdu fatur á løgregluni í morgun, dugdu teir ikki at siga hví so var.

– Motivið er ókent og eingin er handtikin, men vit hava okkurt at ganga eftir í hesum málinum, segði vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

Nakrar tímar seinni – klokkan hálvgum átta – var løgreglan úti í eysturbýnum í Havn, har eldur var í eini kjallaraíbúð. Løgreglan sigur, at okkurt bendir á, at tað er eitt barn, sum hevur spælt við eld. Eldur kom í eina leiku, sum so festi í eina vatnslangu. Hol kom á hesa og vatnsprænurin stóð úr slanguni, sum sløkti eldin, men var orsøkin til, at íbúðin fekk nakað av vatnskaða, umframt nakað av roykskaða eisini var.

**Koyrdi 145 km/t**

Sunnunáttina steðgaði løgreglan ikki færri enn fýra bilum í høvuðsstaðarøkinum, har allir vístu seg at vera ávirkaðir. Aftrat hesum fingu nakrir bilførarar treytaða frádøming av koyrikortinum, tá teir vóru steðgaðir fyri at koyra ov skjótt í Norðoyatunlinum í gjár. Ein annar bilførari misti koyrikortið á staðnum, tá løgreglan máldi hann at hava koyrt 145 km/t á landsvegnum uttan fyri Hvalvík og Streymnes. Hesin mátti pent handa løgregluni lyklarnar til bilin, og so mátti onkur annar heinta hann seinni.

Annars sigur løgreglan, at teir eisini hava verið úti til húsaófrið, umframt at smærri herverk eisini eru framd í býnum.

6 PLETSKOT FRÁ DELTA
– HVÍ GJALDA MEIRA

NOKIA 1110i
Lítil og lætt fartelefon við innbygdum hondfríum hátalara, vibrator o.m.ø.
Vekt. 85 g.
KR. 415,-



SONY ERICSSON K550i
2 mp kamera, bluetooth, video, FM-radio, mp3 spælari.
Vekt. 85 g.
KR. 2.185,-



NOKIA 6300
2 mp kamera, bluetooth FM-radio, mp3-spælari, stereoheadset og 128 mb micro SD-kort íroknað prísin
Vekt. 91 g.
KR. 2.235,-



SONY ERICSSON Z310i
VGA kamera, bluetooth, MMS, GPRS, edge, indbygdur hondfríur hátalari.
Vekt. 90 g.
Nýtt
KR. 1.199,-



NOKIA 6085
VGA kamera, bluetooth video, MMS, FM-radio, mp3 spælari.
Micro SD-kortlesari.
Vekt. 84 g.
KR. 1.299,-



SONY ERICSSON K810i
3,2 mp kamera, bluetooth, video, FM-radio, mp3 spælari.
Vekt. 115 g.
Nýtt
KR. 3.399,-



DELTA
ELEKTRONIKTÆNASTAN
GONGIN 1
FO-100 TÓRSHAVN
TLF. 318050
FØROYA STØRSTA ÚRVAL AV FARTELEFONUM



Bygningur til sølu

Matr. nr. 772 h og 777 f, Niels Finsensgøta 51.

3 x 100 $m^2$.

Bygningurin hevur verið nýttir til vinnuligt endamál. Bygningurin er í góðum standi og er væl bjálvaður. Vindeyguni eru nýggj. Takið verður skift. Útsýnið er gott.

Ein perla í býnum beint yvirav Sjónleikarhúsinum. Ein góð íløga fyri tann rætta!

Verður selt um nøktandi boð fæst.

Ring á tlf. 21 33 03

## Harðskapur á Sandi

Seint mikukvøldið vórðu boð send eftir løgregluni til eini hús heima á Sandi, har ein maður um fjøruti ára aldur hevði lagt á ein 80 gamlan mann. Sambært sýslumanninum í oynni varð eldri maðurin sendur á Landssjúkrahúsið til kanningar. Høgni í Dali, sýslumaður, sigur, at nøgvar leysasøgur hava gingið í oynni síðani hendingina, men at lítið hald er í hesum, tí ongi vitni vórðu til hendingina og enn er onki prógvað.

– Millum annað hava gitingar verið um, at yngri maðurin skuldi havt sligið við einari sleggju, men har vóru ongi vápn ella amboð uppi í. Fólk halda seg vita, men tey gita, sigur sýslumaðurin.

Málið verður nú kannað, og ongin er varðhaldsfongslaður ella skuldsettur.